# GERÐABÓK

**Dato: 24. mai 2007**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 70/07-92/07**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

J. nr. 2004002360–7 SG

**LUTTÓK EISINI:**
Edvard Joensen

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagskránna.**

**76/07** **<u>2007-1292</u>**

**<u>Fríøki við Myllutjørn – Karlamagnussarbreyt</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býlingarnir og Miðstaðargøtan í Hoyvíkshaganum hava enn eingi fríøki tengt at sær. Dalurin langi verður verandi sum hann er nakað enn, við undantaki at gøtur, ið lætta um sambandið verða gjørdar.

Myllutjørn og økið millum Miðstaðargøtuna og Myllutjørn liggur miðskeiðis í økinum og er hugsað sum eitt felags fríøki og samstundis sum atgongd til Dalin Langa, ið forsetur víðari út í landslagið. Fríøki við Myllutjørn er 6.000 m² til støddar og verður partvís tjørn, grønt øki og lagt øki.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at 500.000,- kr. verða settar av til projektering og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**77/07** **<u>2007-1290</u>**

**Útstykking – Djúpagil – Millum Gilja.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Útstykking í økinum, har Djúpagil møtir nýggja sambindingarvegnum við nýggja innkomuvegin.
Útstykkingin liggur í náttúruvøkrum umhvørvi við áum og gilum, sum seinni blíva størri við Djúpagil. Ætlanin er, at avkoyring til skal verða frá nýggja sambindingarvegnum til útstykkingina.

Útstykkingin vil halda fram við verandi útstykkingar fram við gilinum, niðan til nýggja sambindingarvegin og harvið eisini binda økini á báðum síðum av sambindingarvegnum meira saman.

Økið kann íalt hýsa 30 nýggj grundøki við møguliga einum øki til stovnsbygging eystanfyri. Hetta síðsta vil tó helst krevja eina íbinding afturat í sambindingarvegin.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at 500.000,- kr. verða settar av til projektering og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum. Hon heitti samstundis á umsitingina at fyrireika útstykkingina soleiðis, at stykkini verða seld liðugt planeraðið. Kunnað var um at talan er um eina útstykking við 300 fermetra stykkjum við felags parkeringsplássum, gøtusambondum og skipaðum fríøkjum. Nettonýtslustigið verður 0,4.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at leggja kr. 500.000,- út til projektering og leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**78/07** **2007-1275**

**Gøtuætlan - Dalurin langi í Hoyvík**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Sambært ætlan fyri Hoyvíkshagi Suður, er Dalurin Langi lagt av til fríøki fyri býarpartin. Ein høvuðsgøta í dalin skal:

Verða ein ferðslutrygg leið í Hoyvíkshaga Suður.
Binda býlingar, stovnar og handilsøki saman.

Hava samband við verandi gøtu kervi.

Karlamagnussarbreyt fer næstu árini at verða merkt av byggivirksemi. Í tí sambandi metir umsitingin at longu nú er tørvur fyri einari tryggari gonguleið í HHS sum fyribils alternativ til Karlamagnussarbreyt.

**Ískoyti:**
Gøtan er tilsamans 1000 m long íroknað samband millum høvuðsgøtu og útstykkingar. Gøtan verður 2 m breið, soleiðis at minni arbeiðsakfør heva atgongd til vegin í samband við kavarudding v.m. Av tí at talan er um eina høvuðsgøtu, eigur ljós at setast upp fram við gøtuna.

| | | |
|---|---|---|
| Útreiðslur til gøtuna: | 1200 kr. x 1000 m. | 1.200.000 kr. |
| Útreiðslur til 20 lampur inkl. fundament, kaðal v.m.: | | 200.000 kr. |

Samlaðu útreiðslurnar til gøtuna verður tá 1.400.000 kr u.mvg. svarandi til 1.487.500 kr.

Samlaðu útreiðslurnar til gøtuna verður tá 1.400.000 kr u.mvg. svarandi til 1.487.500 kr.

**Tilmæli:**
Byárarkitektin og tekniski stjórin mæla til at taka undir við uppskotinum og játta 1.487.500 kr.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**79/07** <u>**2003-2371**</u>

<u>**Søplupláss til matvørur v.m. í Vágsbotni**</u>

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Plássið í Vágsbotni, ið sambært politiviðtøkuni § 34, 2. petti, verður nýtt til sølu av nýveiddum fiski, fugli o.t., lýkur ikki reinføriskrøv o.a., sum fylgja av matvørulógini. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur boðað kommununi frá, at um søluplássið skal góðkennast til sølu av matvørum, eigur tað at skipast sambært galdandi krøvum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir heilsu- og umhvørvisnevndini til at samtykkja, at álagt verður umsitingini at gera skitsuuppskot og kostnaðarmeting av søluplássi, ið kann góðkennast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni til sølu av matvørum, at leggja fyri nevndina aftur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

**Ískoyti:**
Skitsuuppskot og kostnaðarmeting av søluplássinum fyriliggur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. september 2005:** Nevndin ynskir at umsitingin setur seg í samband við partarnar í málinum, áðrenn støða verður tikið til skitsuuppskotið.

**Ískoyti:**
Málið er sent til hoyring hjá Heilsufrøðiliga starvsstovan og hjá Tórshavnar Havn. Málið er samstundis beint í ferðslunevndina og byggi- og býarskipanarnevndina til viðmerkingar.

Heilsu- og umhvørvisdeildin ynskir at fáa byggi- og býarskipanarnevndina at taka støðu til um byggiloyvi til sølupláss í Vágsbotni kann veitast.

Málið verður við hesum lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Býararktiekturin mælir til at loyvi verður at byggja omanfyrinevndu sølupláss.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Nevndin tekur undir við at arbeitt verður víðari við ætlanini.

**Ískoyti:**
Við støði í viðmerkingum frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Tórshavnar havn leggur umsitingin eitt meira ítøkiligt uppskot til sølupláss í Vágsbotni fram á fundinum, sí mál 2003-2371/13.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at søkt verður hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni um loyvi til sølupláss fyri veiðu í Vágsbotni og at arbeitt verður víðari við ætlanini.

**Tekniska nevnd 9. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Ferðslunevndin 21. februar 2006:** Nevndin tekur undir við uppskotinum.

**Ískoyti:**
Umsókn viðv. søluplássi í Vágsbotni er sent Heilsufrøðiligu starvsstovuni (HS) 8. mars 2006. Í brævi hin 2. juni 2006 kann HS geva tilsøgn til sølupláss í Vágsbotni, um niðanfyri nevndu treytir verða fylgdar:

- Týning av skaðadjórum. Rottukassar skulu plaserast fram við kaiøkinum.
- Vesifasilitetir, sum ikki eru almennir, skulu verða til sølufólkið.

Umsitingin mælir til, at vesifasilitetir verða gjørdir í húsinum hjá bátafelagnum. Ein nýggj kostnaðarmeting av søluplássinum fyriliggur (sí j. nr. 2003-2371/21).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla fíggjarnevndini til at játta kr. 1,55 mill. til gerð av søluplássi í Vágsbotni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við ætlanini og at biðja umsitingina um sundurgreina uppskot um fígging.

**Broyting í tilmæli:**
Av tí mælt verður til at gera arbeiði í stigum, har fyrsta stig er teir fyrstu 8 yvirdekkaðu plintarnir, og toilett til sølufólkið, er tilmælið broytt soleiðis:

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta uml. kr. 1,0 mill. til gerð av søluplássi í Vágsbotni av konto fyri íløgur.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við samtyktini hjá byggi- og býarskipanarnevndini 30. oktober 2006.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Nýtt:**
- Tilboð eru innkomin fyri fyrsta byggistig og varð J.B. Kyster lægstir, áljóðandi 2.800.440,- kr., uttan MVG.
- Næsta byggistig, verður mett at kosta uml. 1.500.000,- kr. uttan MVG, um gingið verður eftir verandi einleikaprísum.
- Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina við projektering, eftirlit v.m. er umleið 4.500.000,- kr. uttan MVG.
- Partur av verkætlanini umfatar nýggjan kaikant.

**Tilmæli:**
Tekninski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at taka undir við at gera fyrsta byggistigið og at nevndin umvegis fíggjarnevndina játtar pening til verkætlanina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 15. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og mælir býráðnum um fíggjarnevndina at játta kr. 2,4 mió. til verkætlanina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og at játta kr. 2.4 mió. afturat kr. 1 mió., sum áður er játtað.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**80/07** **2007-1458**

**Dispositiónsuppskot: Nevndarviðgerð – Glyvursvegur 6. byggistig.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við at farið verður undir útbjóðing av 5. stigi av Glyvursvegnum í næstum, skal tekniska nevndin taka støðu til linjuføring av Glyvursvegnum 6. stig. Talan er um strekkið frá íbindingini til útstykkingingina hjá Valbirni Dalsgarð og suður í móti sunnaru síðu á útstykkingini á Hamrinum.

Umsitingin leggur fram uppskot um linjuføring og greiður frá hvussu íbinding til útstykkingina, barnagarðin og aðrar framtíðar bygging kann verða gjørd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 200.000 til skitsuprojekt av Glyvursvegnum 6. stig at leggja fyri nevndina aftur. Peningur er ikki avsettur á íløguætlanini fyri 2007.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at játta kr. 200.000,- av konto fyri íløgur fyri 2007.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**81/07** **2007-1025(sí j. nr. 2001-0407)**

**Legging av høvuðsvatnleidningi eftir atkomuvegnum til Havnar**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Landsverk hevur latið gera atkomuvegin til Havnar á strekkinum frá Sundsvegum til økið norðan fyri útstykkingina millum Gilja. Umsitingin hevur í hesum sambandi havt samskifti við Landsverk og aðrar leidningseigarar um møguleikarnar at leggja høvuðsvatnleiðingina í vegin. Tað er umráðandi, at nýggir býarpartar verða knýttir til eina høvuðsvatnleiðing og serliga á teimum pørtum í býnum, sum liggja hægri uppi.
Fyri at nøkta tørvin fyri vatnnýtslu á økinum við Stórutjørn og nýggja skúlan í Hoyvík, er neyðugt at farið verður undir at leggja ein høvuðsvatnleidning frá Sundsvegnum til Sambindingarvegin, ið er í gerð.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Samlaða longdin at leggja høvuðsvatnleidningin er uml. 800 m og mett verður, at kostnaðurin fyri arbeiðið er uml. 1 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á vatn- og gøtuljósdeildini mæla til játta kr. 200.000 - við at umprioritera á íløguætlan fyri 2007 - ella á annan hátt til at gera útbjóðingartilfar at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og leiðaranum á vatn- og gøtuljósdeildini og at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at játta kr. 200,000,- fíggjað av íløgum fyri 2007.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**82/07** **2007-1412**

**Projektuppfylging: Nevndarviðgerð - Uppskot til busslummar – Sambindingarvegur 8 - Løgmannabreyt við íbinding í landsveg.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Umsitingin hevur latið gjørt trý uppskot til busslummar í sambandi við Sambindingarvegin og við atliti til Stórutjørn. Víst verður til uppskot nr. 1 og 2 og 3, sí j. nr. 2007-1336/1.

**Fíggjarligu viðurskifti:**
Gjørd er ein samlaða kostnaðarmeting fyri 5-7 busslummar, kr. 1.037.000,- íroknað projektering, eftirlit, óvæntaðar útreiðslur og mvg, sí skjal nr. 2006-1750/5.

Støða skal vera tikin til um farast skal undir gerð av hesum busslummum og hvussu fíggingin skal fáast til vega.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja uppskot nr. 3 til busslummar, og umvegis fíggjarnevndina og býráðið at játta kr. 1.500.000,- eyka fyri 2007 til verkætlanina "Sambindingarvegur Klingran-Løgmannabreyt við íbinging í landsveg" sambært skjali nr. 2006-1750/5.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 1.500.000,- av íløgum 2007.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

83/07 **2007-1449**

**Projektuppfylging: Nevndarviðgerð - Broyting av vegaskráum og eykakostnaður - Sambindingarvegur Klingran - Løgmannabreyt við íbinding í landsveg**

**Lýsing av málinum - samandráttur**
Eftir at arbeiðið uppá sambindingarvegin er byrjað er staðfest, at tilfarið á økinum er ov vánaligt til at gera vegskráar við halli á 1:1,5, sum upprunaliga projekterað. Neyðugt verður at lækkað hallið á skráanum til 1:1,7. Hetta viðførir eyka spreingi- og jørðarbeiði.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Meirkostnaðurin er fyribils mettur til kr. 1,5 mió. íroknað projektering, eftirlit, óvæntaðar útreiðslur og mvg, sí skjal 2007-1450/2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta kr. 1.500.000,- eyka fyri 2007 til omanfyri nevnda eykaarbeiði, "Sambindingarvegur Klingran-Løgmannabreyt við íbinging í landsveg" sambært skjali nr. 2007-1450/2. Peningur er ikki avsettur á íløguætlan fyri 2007.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og mælir býráðnum til um fíggjarnevndina at játta kr. 1.500.000,- av íløgum fyri 2007.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 1.500.000,- av íløgum 2007.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**84/07** **2007-1197**

**Trygdar- og eftirlitsskipan á kommunalu vatnveitingini**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við tekniska óhappið á vatnveitingini í september 2006, var avgerð tikin um at fara undir ávísar ábøtur á vatnveitingina í kommununi.
Á reinsiverkunum í Havnardali og Villingadali er trygdarventilur uppsettur, ið steingir fyri vatnveitingini um so er at streymslit verður.

Arbeitt verður við at fáa eina alarm- og eftirlitsskipan at virka, soleiðis at vatnverkið via teldu- og telefonskipan fær neyðugar ávaringar ella fráboðanir í góðari tíð. Eisini ber til at fáa støðugt eftirlit við vatnveitingini via telesamskifti.

Leiðarin á vatn- og gøtuljósdeildini kemur at greiða frá.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur latið gera eina fyribils kostnaðarmeting fyri nevndu alarm- og eftirlitsskipan. Sí notat j.nr. 2007-1197/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á vatn- og gøtuljósdeildini mæla til at játta kr. 500.000,- av íløgum fyri vatnveitingar í 2007. Upphæddin er avsett á íløguætlanini fyri 2007.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og leiðaranum á vatn- og gøtuljósdeildini.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 500.000,- av íløgum 2007.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**85/07** **2007-1018**

**Umlegging av Sundsvegnum (sí j. nr. 2001-0407)**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við at Landsverk eru farnir undir at gera atkomuveg til Havnar og at ætlanin í næstum er at fara undir vegarbeiðið frá Villingadalsvegnum og suður ímóti økinum ' undir Krákugjógv' er neyðugt, at kommunan tekur støðu í málinum um umleggingina av Sundsvegnum. Víst verður til mál nr. 2005-1533 Brúgv um Hoydalsá og Sundsvegin, har meirilutin í byggi- og byarskipanarnevndini tann 5. november 2005 samtykti, at geva Landsverk loyvi at fara undir brúgvaarbeiðið.

Støða skal verða tikin til, um farast skal undir arbeiðið at projektera og bjóða arbeiðið út at umleggja Sundsvegin – á strekkinum har sum atkomuvegurin til Havnar kemur at liggja.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Arbeiðið at umleggja Sundsvegin fevnir í prinsippinum um at leggja uml. 360 m av nýggjum vegi umframt niðurtøku av verandi vegi. Samlaði kostnaðurin fyri arbeiðið er mettur til uml. 5 mió. kr.
Harumframt er neyðugt at fáa avtalu í lag við eigaran av matr. nr. 1470bx, Tórshavn, um endurgjald fyri mist lendi og møguliga niðurtøku fyri eini úthús/summarhús. Í løtuni fyriliggja ongar metingar fyri hetta arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000 fíggjað av íløgum fyri vegir 2007 til at gera útbjóðingartilfar av arbeiðinum at umleggja Sundsvegin at leggja fyri nevndina aftur. Mælt verður eisini til, at farið verður undir samráðingar við eigaran av matr. nr. 1470bx. Peningur er avsettur á íløguætlan fyri 2007 – álj. 2 mió kr.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Ein meiriluti, Leivur Hansen, Sjúrður Olsen, Marin Katrina Frýdal og Høgni Mikkelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.
Ein minniluti Katrin Dahl Jakobsen tekur ikki undir við tilmælinum, tá málið stríðir ímóti samtyktini í býráðnum frá 15. desember 2005 og sum er galdandi til onnur býráðssamtykt fyriliggur.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og játta kr. 500.000,- av íløgum 2007.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini og at játta kr. 500.000 til umlegging av Sundsvegnum.

**86/07** **2004-2626**

**Viðvíkjandi almennan vegrætt**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Matrikulstovan søkir vegna Jógvan Hans Østørø um at tinglýsa ein almennan vegrætt gjøgnum matr. nr. 24a, Velbastað, á sama stað sum ein matrikulservituttur er um veg.

Vegrætturin skal strikast seinri og leggjast út sum fríøki, tá ið sunnari partur av vegnum er knýttur í almennan veg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tinglýsa ein almennan vegrætt á matr. nr. 24a,. á Velbastað, sambært kortskjali í journal nr. 2004-2626/82. Vegrætturin verður ein fyribils loysn, til vegatkoma fæst til útstykkingina av Stórheyggi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

- Nú arbeiðið at byggibúgva útstykkingina á Jákupstrøð og Skarpheyggi er liðugt, skal tekniska nevndin taka støðu til útstykkingarætlanina og yvirtøku av vegnum. Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at yvirtaka útstykkingarvegin.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum við teimum viðmerkingum, ið nevndar eru í notati j. nr. 2004-2626/96.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**87/07** **2006-1340**

**Raðfesting av íløgum í smábátahavni/smábátapláss.**

DHI hevur gjørt modelroyndir av bátahyli í Álakeri í sept./okt. 2006.

Í royndunum hevur dentur verið lagdur á, at umframt at tað skal vera kyrt í einari nýggjari bátahavn, skal kyrran í havnini í Tórshavn og í verandi bátahyli á Argjum ikki versna.

Úrslitið av modelroyndini, sum er komið, vísir, at tann rætningurin á brimgarðinum, sum gevur bestu kyrruna i Tórshavnar havn og nýggjum bátahyli í Álakeri, ger tað ókyrrari í verandi bátahyli á Argjum. Fyri at tað ikki skal gerast ókyrrari á Argjum, er neyðugt at leingja verandi brimgarð á Argjum.

Um brimgarðurin á Argjum verður longdur við 20 m, verður bátahylurin enn kyrrari enn hann er nú, men hetta gevur einki bátapláss.

Um brimgarðurin á Argjum verður longdur við 180 m, verður bátahylurin á Argjum enn kyrrari, enn um hann verður longdur við 20 m, og hetta gevur møguleika fyri 75 nýggjum bátaplássum.

Kostnaðarmeting er gjørd av ymiskum útbyggingrmøguleikum í Tórshavnar kommunu, sum útvega fleiri bátapláss.

| Stað | Bátapláss | Kostnaður |
|---|---|---|
| Álaker | 150 | 25,9 mió |
| Argir leingja brimgarð 20 m | 0 | 3,0 - |
| Argir leingja brimgarð 180 m og gerð av bátaplássum | 75 | 15,5 - |
| Gamlarætt hyl inn í lendið | 43 | 6,5 - |
| Gamlarætt hyl inn í lendið | 23 | 4,9 - |
| Signabø, verandi hylur | 50 | 2,7 - |

Í løtuni er tørvurin á bátaplássum nógv størstur í Tórshavn/Argjum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og havnameistarin mæla til at leingja brimgarðin á Argjum við 180 m og at gera pláss fyri 75 bátum at fíggja av konto fyri íløgur í smábátahavnir fyri 2007, 2008 og 2009.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007**: Samtykt taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, havnanevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Samtykt at beina málið til umsitingina til víðari viðgerð.

**Havnanevndin 12. februar 2007:** Ein meiriluti Leivur Hansen, Annika Olsen, Høgni Mikkelsen og Jógvan Arge taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum, tekniska stjóranum og havnameistaranum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1 mió. av íløgum í smábátahavnir til projektering og fyrireiking.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**88/07** **2001-0470**

**Skriv frá Badmintonfelagnum í Havn, dagfest 9. februar 2001, har felagið skjýtur upp, at Tórshavnar kommuna yvirtekur Badmintonhøllina**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til alt málið j. nr. 2001-0470, sum niðarfyristandandi er úrdráttur úr og sum ískoyti er til.

Í vetur hevur Badmintonfelagið í Havn vent sær til Tórshavnar kommunu við fyrispurningi um kommunan vil yvirtaka Badmintonhøllina. Høllin er í vánaligum standi og er neyðugt at gera bráðneyðugar umvælingar m.a. á tekjuna.

Skuldin í høllini er 1,2 mill. kr. Tórshavnar kommuna leigar ein part av høllini til Frítíðarskúlan og goymsluhøli til húsaumsitingina fyri kr. 22.000,00 um mánaðin.

Uppskot til reglugerð fyri Badmintonhøllina í Gundadali, sum umboð fyri Badmintonhøllina og umsitingina hava gjørt:

**Reglugerð**

**fyri**
**Badmintonhøllina í Gundadali**

Í sambandi við at Tórshavnr kommuna yvirtekur Badmintonhøllina, ið er bygningur á matr. nr. 1268 a, Gundadalur, 100 Tórshavn, har kommunan eigur lendi framman-undan, verður henda reglugerð at seta í gildi fyri virksemið í høllini.

Tí verður ásett fylgjandi:

**§ 1**

Raksturin, herundir tilrættislegging og samskipan av tí, sum skal fara fram í Badmintonhøllini, verður undir fyrisæti av Tórshavnar kommunu, mentamáladeildin.

Í hesum sambandi skal mentamáladeildin síggja til, at høllin fyrst og fremst verður at nýta til badminton, og verður deildini heimilað at gera nærri avtalu við badmintonfelag um nýtslu av høllini, herundir áseting av gjaldi fyri nýtslu av høllini.

**§ 2**

Húsaumsitingin hevur skyldu at ansa eftir, at høllin verður væl umsitin. Dagligu leiðsluna av høllini hevur hallarleiðarin í høllini á Hálsi.

Mentamáladeildin kann gera serliga reglugerð fyri nýtslu av høllini, eins og mentamáladeildin er heimilað at áseta leigugjald fyri nýtslu av høllini til onnur endamál enn ítróttarendamál.

Hallarleiðarin á Hálsi førir yvirlit yvir inntøkur og útreiðslur fyri høllina, sum er partur av roknskapinum hjá Tórshavnar kommunu.

Soleiðis samtykt á býráðsfundi tann

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at Badmintonhøllin verður yvirtikin 1. januar 2008 fyri 1,1 mió. kr.
- at góðkenna reglugerð fyri Badmintonhøllina í Gundadali
- at peningur verður avsettur á fíggjarætlanini 2008 at umvæla høllina.

**Mentamálanevndin 17. apríl 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

Málið verður tikið upp aftur í sambandi við fíggjarætlanina 2008.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**89/07** **<u>2004-1528</u>**

**<u>Uppskot til stovnsetan av almennum akvarium í samstarvi við felagið Hav-, Botn- og Streymkanningar - HBS</u>.**

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Framlagt og útsett.

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt at taka upp samráðingar.

**Ískoyti:**
Umsókn frá Gluggahyljum, v/ Bjørka Geyti o.fl, dagfest 3. oktober 2005, um stuðul til fígging av verkætlan.

Ætlanin er at seta á stovn eitt alment akvarium í Havn, sum umframt at vera opið fyri almenninginum eisini er ætlað til undirvísingarbrúk. Hugsanin er, at savnið skal rúma fiski, botndjórum, vøkstrum og øðrum úr havinum kring Føroyar.

Royndarverkætlanin er mett at kosta tilsamans kr. 844.000,00 fyri bæði íløgur og rakstur fyrsta árið.

Heitt verður á býráðið um at stuðla verkætlanini við at lata íshúsið á Argjum fyribils í eitt ár til verkætlanina umframt at fíggja íløgur og rakstur í eitt við tilsamans kr. 844.000,00.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at játta kr. 844.000 av reguleringskonto, treytað av at Tórshavnar kommuna verður eigari av øllum útbúnaðinum, sum er mettur til kr. 500.000,00.

**Nýtt:**
Í skrivi, dagfest 15. mars 2007, boðar Advokatfelagið Í/S frá, at felagið er biðið um at gera uppskot til:

a. Viðtøkur fyri Grunnin Føroya Sjósavn og
b. Leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Grunnin Føroya Sjósavn

Advokatfelagið Í/F biður um viðmerkingar til viðtøkurnar og góðkenning av leigusáttmálanum.

Tilfarið frá Advokatfelagnum Í/F verður sent limunum sum fílur.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2007:** Arbeitt verður víðari við málinum, sum verður lagt fyri aftur á næsta fundi.

**Nýtt:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við málinum, t.e. uppskotinum til leigusáttmála.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at góðtaka uppskotið til viðtøkur og at góðtaka tillagað uppskot til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til góðtaka uppskotið til viðtøkur og at góðtaka tillagað uppskot til leigusáttmála.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**90/07** **2006-3439**

**Søla av matr. nr. 50ø, á Velbastað.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Nú nýggi dagstovnurin á Velbastað er liðugur, verður gl. barnagarðurin seldur, soleiðis at søluprísurin gongur inn fíggingina av nýggja dagstovnin.

Stigtakararnir til frískúlan í Havn hava vent sær til kommununa um keyp av gl. barnagarðinum á Velbastað.

Sp/f Protek hevur mett um søluvirðið á ognini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at selja frískúlanum í Havn ognina fyri dagsprísin, uttan at hon verður lýst alment til sølu

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og at selja ognirnar fyri kr. 2.130.000, sum er mett handilsvirði.

Kommunan treytar sær forkeypsrætt til sama prís í 2 ár við møguligari víðarisølu.

**Býráðið fyri læstum hurðum 22. februar 2007:** Einmælt samtykt at beina málið í fíggjarnevndina.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 5. mars 2007:** Kunnað var um málið.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal samtykti at lýsa ognina til almenna sølu gjøgnum húsasølu.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen samtykti at halda fast við samtyktina í fíggjarnevndini 16. februar 2007.

Tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja til hægsta boð týsdagin 22. mai 2007 kl. 15.00.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at selja fyri hægsta boð á 1,8 mió. kr.

**91/07** **2004-0613**

**Broyting av byggisamtykt fyri Kollafjørð**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ætlanin í j. nr. 200202500 "Uppskot um framtíðar byggisamtykt fyri Kollafjørð" verður samtykt sum ein framtíðarætlan fyri Kollafjørð, er hetta nýggja málið um broyting av byggisamtykt fyri Kollafjørð stovnað.

Umsitingin metir, at tað er neyðugt at broyta partar av byggisamtyktini fyri Kollafjørð beinanvegin, soleiðis at nøkur nýggj byggiøki verða løgd út, og soleiðis at heitini og ásetingarnar fyri tey ymisku økini verða tey somu sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sí kortskjal j.nr. 200400613-5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært kortskjali.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Málið snýr seg um at útvega grundøki til sethúsabygging og øki til miðstaðarbygging.

Nevndin samtykti at taka undir við ætlanini og at beina málið í býráðið.

**Kollfjarðarnevndin 15. mars 2004:** Samtykt at mæla til at taka undir við tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Býráðið 18. mars 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur í skrivi, j. nr. 2003-2155/1, móttikið viðmerkingar til ætlanir hjá Tórshavnar kommunu um at broyta ásetingarnar fyri økið, ið viðkemur festið Sjóaargarður Niðari partur” .

Orsakað av innanhýsis skráseting hevur skrivið ikki verið við í viðgerðini av málinum, og tað er tískil neyðugt, at málið verður lagt fyri nevndina aftur, soleiðis at málið kann viðgerast við støði í øllum fyriliggjandi upplýsingum.

Hjálagt er skriv, j. nr. 2003-2155/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært kortskjali j. nr. 2004-0613/5.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. apríl 2004:** Samtykt at tann parturin, ið skrivið umfatar, j. nr. 2003-2155/1, skal viðgerast av nýggjum og verður beint í kollfjarðanevndina.

**Kollfjarðarnevndin 1. juni 2004:** Nevndin mælir til at tikið verður undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektium viðvíkjandi byggisamtyktini fyri Kollafjørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti.**
Freistin at mótmæla ætlaðu broytingunum av byggisamtyktini í Kollafirði var 5. oktober 2004.

Inn eru komin 3 mótmæli.

**Djóni Thomassen, adv. vegna Connie Dalsgaard:**
Mælt verður ímóti, at matr. nr. 156a, Kollafjørð, sunnan fyri vegin, sum nú er 4. grundumráði (landbúnaður), verður broytt til D1-øki (alment frílendi).

Økið verður í dag nýtt til framleiðslu av vistfrøðiligum høsnareggum, frá uml. 500 hønum.

Til hetta kann viðmerkjast, at D1-øki her er lagt í sambandi við Kirkjugarðin. Sjálvt um økið verður broytt til D1-øki (alment fríøki) kann framleiðslan av høsnareggunum halda fram sum nú, tó verður avmarkað hvat kann byggjast á økinum

**Christian Andreasen, adv. vegna Gunnvør Dam Jensen, festari á Sjóargarði:**
Mælt verður ímóti, at økið "Norðíki", sum nú er 4. grundumráði (landbúnaður), verður broytt til D3-øki (alment endamál).

Eisini verður mótmælt, at økið oman fyri skúlan/ítróttarhøllina, sum nú er øki til almenn endamál, verður broytt til A1-øki (bústaðarbygging).

Orsøkin til kæruna er, at festarin missir rættin til vetrarbit/stráfóður á hesum økjunum, og at hetta fer at taka grundarlagið hjá festinum burtur.

Til hetta er at viðmerkja, at í økinum "Norðíki" er m.a. ætlanin at byggja eina nýggja kirkju.

Økið oman fyri skúlan er, sambært verandi byggisamtykt, lagt út til almenn endamál. Men í sambandi við at kommunan hevur gjørt eina skipanarætlan av økinum, har skúlin og ítróttarhøllin liggja, er tann ovasti parturin lagdur til bústaðarbygging.

Roknast má við, at tað ganga nøku ár, áðrenn hesi økini verða bygd. Og sjálvt um byggisamtyktin verður broytt, verður hetta framvegis ein partur av festinum á Sjóargarði og kann nýtast til vetrarbit/stráfóður.

**Christian Andreasen, adv. vegna Sp/f Carl August Jensen:**
Mælt verður ímóti, at øki niðanfyri handilin, oman móti landsvegnum, verður lagt út til D1-øki (alment fríøki).

Økið vestan fyri handilshúsini er lagt út til C-øki (miðstaðarbygging).

Í kæruni verður víst á, at økið niðanfyri virkisbygningin oman móti landsvegnum eisini átti at verið lagt út til miðstaðarbygging, tá eitt virki er har á staðnum.

Til hesa kæruna kann viðmerkjast, at fyri júst hetta økið, er eingin ætlað broyting frá verandi byggisamtykt fyri Kollafjørð.

Eisini skal vísast á, at verandi handilsbygningur liggur uml. 20 m frá vegmiðju á landsvegnum niðanfyri, og Landsverkfrøðingurin vanliga krevur eina frástøðu uppá í minsta lagi 20 m frá bygningum til vegmiðju.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast um ætlaðu broytingarnar.

**Kollfjarðarnevndin 7. oktober 2004:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 25. oktober 2004:** Eftir at innkomnu mótmælini vórðu viðgjørd, samtykti nevndin at mæla býráðnum til at halda fast við ætlaðu broytingina og at beina málið í kollfjarðarnevndina til kunningar.

**Kollfjarðarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. november 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5. juli 2005 kom skriv frá Innlendismálaráðnum, har víst verður á, at Jón Joensen, vegna eigararnar av ognarmørkini í Kollafirði, hevur sent eina kæru til IMR viðv. broytingini av byggisamtyktini í Kollafirði.

Í kæruni verður m.a. víst á, at teir, í sambandi við framløguna av heildarætlini fyri Kollafjørð, mótmæltu, at innangarðsjørðin hjá ognarmørkini verður avløgd til bústaðarøki.

Í sambandi við heildarætlanina fyri Kollafjørð fekk kommunan mótmæli frá at kalla øllum, sum eiga ella umsita jørð í Kollafirði. Tí valdi kommunan heldur at broyta byggisamtyktina í smáum, so hvørt brúk var fyri tí.

Tá broytingar av byggisamtyktini fyri Kollafjørð verða viðgjørdar, hevur umsitingin valt at síggja burtur frá øllum mótmælunum, sum komu inn í sambandi við heildarætlanina fyri Kollafjørð. Hetta tí, at um hesi skulu takast við hvørja ferð, er byggisamtyktin fastlæst og kan ikki víðkast við fleiri byggiøkjum.

Sjálvandi verða mótmæli ímóti teimum konkretu broytingunum viðgjørd.

Í hesum føri høvdu eigararnir av ognarmørkini ikki lagt til merkis, at broyting av byggisamtyktini var lýst í bløðunum, og tí høvdu teir ikki kært broytingina.

Umsitingin hevur verið á fundi við Jón Joensen saman við eigarunum av ognarmørkini, har teir greiddu frá teirra sjónarmiði og ætlanum við ognunum.

Umsitingin metir ikki at tað er rætt, at kommunan broytir privatar ognir til bústaðarøki ímóti ynskinum hjá eigarunum.

Sambært IMR er ikki neyðugt at leggja broytingina alment fram av nýggjum, um hesin parturin verður tikin burturúr broytingini.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at innangarðsjørðin hjá ognarmørkini verður tikin burtur úr ætlaðu broytingini av byggisamtyktini í Kollafirði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2005:** Nevndin samtykti at halda fast við uppskotið um broytingar í byggisamtyktini.

**Býráðið 15. september 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

-23. mars er skriv komið frá Innlendismálaráðnum har boðað verður frá, at broytingarnar í byggisamtyktini fyri Kollafjørð ikki eru góðkendar.

Grundgevingin er, at viðgerðin í TK av ætlaðu broytingunum ikki hevur verið nøktandi, serliga við atliti at kærunum, ið eru komnar inn.

IMR ger vart við, at tað ikki er neyðugt at leggja uppskotið fram av nýggjum við nýggjari kærufreist, men at ætlaðu broytingarnar saman við kærunum verða viðgjørdar innanhýsis í kommununi av nýggjum. Í sambandi við hesa viðgerð eigur kommunan at gera sær greitt, í hvønn mun hon velur at fylgja ella ikki fylgja broytingaruppskotum og mótmælum.

Víst verður á, at tá tosað verður um mótmælir er tað, umframt tey ið vóru viðgjørd á fundinum 25. oktober 2004, Djóni Thomassen, adv. vegna Connie Dalsgaard, Christian Andreasen, adv. vegna Gunnvør Dam Jensen, festari á Sjóargarði, og Christian Andreasen, adv. vegna Sp/f Carl August Jensen, eisini mótmæli frá Jón Joensen vegna eigaranar av ognarmørkini.

Av tí at málið við ognarmørkini hevur verið ein stór orsøk til, at málið er so nógv seinkað, verður mælt til, at ognarmørkin verður tikin burturúr ætlaðu broytingini fyribils.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at innangarðsjørðin hjá ognarmørkini verður tikin burtur úr ætlaðu broytingunum av byggisamtyktini í Kollafirði og at hildið verður fast um hinar ætlaðu broytingarnar. Og at kærarinir fáa eitt nýtt grundað skrivligt svar upp á mótmæli og broytingaruppskot.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. apríl 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**92/07** **<u>2002-2686</u>**

**<u>Umsókn um øki til Dansifrøi og stuðul til bygging</u>**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um øki og loyvi til felagsbygging til 2 felags høli til Dansifrøi og Fimleikafelagið Ljósið.

Feløgini vísa á øki í Gundadali, ið er ogn hjá TK, og liggur sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, í umráðispartinum D2.

Hjálagt er:
Umsókn frá umsøkjaranum: j.nr. 200202686-2
Tekningar av skitsuprojekti: j.nr. 200202686-2
Kortskjal av økinum: j.nr. 200202686-3

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Dansifrøi hevur fyrr havt samband við umsitingina, har teir hava søkt um at fáa útvega økið, men hava ikki víst á nakað, sum umsitingin hevur mett verða gongd leið.

Umsitingin hevur havt samráðingar við fimleikafelagið í sambandi við, at teir upprunaliga søktu um einhvørja høll, av tí at teir høvdu stóran hølistørv. Í hesum sambandi vísti umsitingin tá á, at teir arbeiddu við einari ætlan úti í Marknagili, sum teir kundu gerast partur av.

Ætlanin bleiv síðani slept, og hevur umsøkjarin so vent sær aftur til TK við umsókn um at fáa ávíst eitt annað øki, nú saman við Dansifrøi.

Arkitekturin hevur verið á byggideildini og framlagt verkætlanina fyri býararkitektinum og hevur fingið at vita, at ymisk viðurskiftir uttanfyri, so sum parkering og ferðsla í sambandi við verkætlanina skulu endaliga viðgerast í samráð við umsitingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at lata umsøkjaranum økið at byggja verkætlanina á.

Samstundis verður mælt til, at álagt verður umsøkjaranum, at skipa soleiðis fyri, at parkering og onnur uttanumviðurskifti verða gjørd í samráð við umsitingina hjá TK.

Endaliga verður gjørt vart við, at endalig umsókn um byggiloyvi skal leggjast fyri nevndina aftur, tá ið allar tekningar og neyðug loyvi fyriliggja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2003:** Mikael Viderø, býararkitektur, kunnaði nevndina um felagsbygningin hjá Dansifrøi og Fimleikafelagnum Ljósinum.

Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 29. september 2003 treytað av, at ungdómsdansur verður ein partur av verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 9. oktober 2003:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at taka upp samráðingar um økið.

**Ískoyti:**
Broyting er hend soleiðis, at fimleikafelagið Ljósið er farið úr verkætlanini. Felagið Dansifrøi er komið við broyttari verkætlan.

Nýggjar tekningar eru komnar frá Arkitektavirkinum Magnus Hansen.

Gólvvíddin er 840 $m^2$.

Mesta hædd á bygningi 9,5 m.

Tal av bilstøðlum 40, kravt tal av bilstøðlum 1 stk/50 $m^2$.

Av tí at enn ikki er avgjørt um grundøkið skal frámatrikulerast, ber ikki til at rokna byggistig ella nettonýtslustig.

Bygningurin liggur í økispartinum D2 ítróttarøki.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at broytta verkætlanin verður góðkend, og at umsóknin um byggiloyvi verður gingin á møti. Samstundis verður mælt til, at fíggjarnevndin viðger nýggju fíggjarligu viðurskiftini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at góðkenna broyttu verkætlanina og at ganga umsóknini um byggiloyvi á møti.

Samstundis verður spurningurin um tær nýggju fíggjarligu fyritreytirnar beindur í viðkomandi nevndir.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Umrøtt og verður tikið uppaftur, tá mentamálanevndin hevur viðgjørt málið.

**Nýggj umsókn um stuðul**.

**Á fundi í mentamálanevndini 10. februar 2004** samtykti nevndin at játta 30% av kr. 16.500.000,00, sum býráðið á fundi 19. februar 2004 samtykti at taka undir við mentamálanevndini, sum sostatt fellur burtur nú nýggj umsókn er komin.

- Í nýggju umsóknini, dagfest 11. juli 2005, er kostnaðarmetingin kr. 7.600.000,00 tilsamans uttan MVG ella kr. 9.500.000,00 við MVG, og søkir Dansifrøi um øktan stuðul frá teimum 30% til 60% fyri at verkætlanin kann gerast veruleiki beinanvegin.

Við 30% kr. 2.850.000,00 og 60% kr. 5.700.000,00.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta 60% av kr. 9.500.000,00 svarandi til kr. 5.700.000,00 í stuðli av konto 64, og at leggja málið fyri býráðið, um fíggjarnevdina, til góðkenningar.

Eisini samtykt at heita á umsitingina um at gera avtalu um nýtslurætt til hølini til m.a. ungdómsdans og leggja avtaluna fyri nevndina til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Málið var umrøtt og samtykt í prinsippinum at taka undir við mentamálanevndini at veita 60% í stuðli, nú landið ikki stuðlar, við nærri treytum og at leggja málið fyri á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at stuðla hallarbyggingina við 5,7 mió. kr. yvir 5 ár við trygd í ognini og avtalu um nýtslurætt og at leggja málið fyri mentamálanevndina og býráðið.

**Býráðið 26. januar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 8. februar 2006:** Samtykt at taka undir við uppskotinum um avtalu millum Tórshavnar kommunu og Dansifrøi um nýtslurætt til felagshúsið, j. nr. 2002-2686.

**Ískoyti:**
Í sambandi við býarskipanararbeiðið, sum fer fram av økinum í og kring Gundadal, vísandi til nógvu verkætlanirnar, sum bæði kommunan og felagsskapir hava staðsett í økinum, hevur umsitingin mett um staðsetingina av bygninginum hjá Dansifrøði.

Tá nevndin seinast viðgjørdi málið, í samband við prinsipiella tilsøgn um byggiloyvi, vóru munandi øðrvísi fortreytir at leggja til grund fyri støðutakanini til staðseting í mun til aðrar byggingar í økinum. Her er tað serstakliga núverandi verkætlanin hjá grunninum Tórsvølli sum hevur við sær, at tað ikki kann metast ráðiligt at staðseta byggingina hjá Dansifrøði har sum upprunaliga skotið upp. Tættleikin millum báðar verkætlanirnar má metast at vera ov stórur, og kemur at treingja óneyðugt samanum.
Vísandi til at Tórshavnar kommuna eisini fer undir eina víðkan av høllini á Hálsi og atlitið til at Gundadalshøllin hevur framíhjárætt til lendi at víðka móti ætlaðu staðsetingini til Dansifrøði, má metast at økið fer at gerast ov trongt.

Umsitingin hevur tískil víst á aðra staðseting til byggingina hjá Dansifrøði. Sí kortskjal dagfest. 22.02.2007.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta byggingina hjá Dansifrøði sambært kortskjali dagfest. 22.02.2007, vísandi til at hetta er sera hóskandi øki, har verkætlanin vil kunna stuðla væl undir virkseminum og parkeringviðurskiftunum í sambandi við høllina á Hálsi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 22. februar 2007:** Málið útsett.

**Uppískoyti:**
Skriv er komið frá felagnum, har teir vísa at teir eru glaðir fyri staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 2. apríl 2007:** Ein meiriluti Jógvan Arge, Katrin Dahl Jakobsen og Bjarti Mohr samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen og Leivur Hansen mælir til at halda fast við upprunaligu staðsetingini av felagshúsi og varðveita geiran millum Ítróttarhøllina og R.C.Effersøesgøtu sum eitt grønt øki.

Harumframt samtykti nevndin at leggja avgerðina fyri býráðið.

**Býráðið 24. mai 2007:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Katrin Dahl Jakobsen, um at beina málið aftur í byggi og býarskipanarnevndina, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Greiddu ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Hildur Eyðunsdóttir og Jógvan Arge.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen og Bjarti Mohr.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

At enda varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, og Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Katrin Dahl Jakobsen

**FUNDUR LOKIN KL. 20:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |